# ins nalva



ini eru bert nøkur fá ár yngri enn eg, millum 12 og 16 ár.

Skrivstovan hevur enn ikki skrivað allar næmingarnar inn og tískil vilja tey heldur ikki útflýggja bøkur til næmingarnar ella lærararnar enn. Tríggjar vikur eru longu farnar av skúlaárinum, men tað tykist eins og, at eg eri tann einasti persónurin, ið hugsar um, at vit enn ikki hava fingið nakað undirvísingartilfar. – Ja, øll hini eru jú fødd og uppvaksin í Peru, so tey eru von við tempo'ið her. Ístaðin brúki eg nógva tíð upp á at gera undirvísingartilfar mítt á sponskum sjálv, meðan Américo skrivar nýggjar enskar sangir, sum vit kunnu nýta í undirvísingini. Américo er júst liðugur sum lærari. Hann er sannførdur um, at man lærir best, um man sjálvur luttekur í undirvísingini og hugsar hervið øðrvísi enn meginparturin av hinum lærarunum. Í hansara tímum rópar man seg ikki hásan, soleiðis sum gamli lærarin í flokksstovuni við síðuna av ger hvønn dag.

Umleið 70% av íbúgvunum í Heilaga Dalinum hjá inkarunum hava quechua sum móðurmál, spanskt sum fyrsta fremmandamál og tí verður enskt annað fremmandamál teirra. Ikki er tað so løgið, at nógv hava ringt við at skilja ensku úttaluna og ensku mállærureglarnar, tí tímatalið í enskum er sera lítið; tey hava bert ein enskttíma um vikuna, meðan tey hava fak sum rokning heili tríggjar ferðir.

Næmingarnir í skúlanum eru rættiliga engageraði; tey liggja í mentaliteti langt frá teimum smásløvu føroysku næmingunum, ið kenna seg vís í, at skúlin bert er uppfunnin fyri at revsa tey. Langt frá PISA-kanningum, har man meinar, at ringu úrslitini í stóran mun stava frá sløva næmingahugburðinum.

Heima í Føroyum er tað langt síðani vorðið ómodernað at siga "tygum" við ein lærara ella at brúka eftirnavn hansara. Eg royni framvegis at venja meg við at verða rópt "profesora" – eg vil jú satt at siga helst hava, at tey bara rópa meg "Ani" (eingin her í Suðuramerika dugir at siga "Annika", oftast endar tað sum "Amnita" ella okkurt líknandi). Tá ið eg royni at tosa sum vinir við børnini, svara tey fólkaliga aftur og hyggja burtur. Tað er ikki vanligt, at ein lærari vil tosa við tey, sum man er á sama støði. At lærarar og næmingar kunnu hava eitt forhold, ið byggir á annað enn lýdni og disiplin er heilt óhoyrt; tað kemur ikki fyri. Vil man broyta hetta, noyðist man eisini sjálvur at gera ein innsats. Eg ætli mær tí treisk halda áfram við at hava spanskt "smalltalk" við næmingarnar; summi teirra eru jú bert nakrir mánaðir yngri enn eg – summi enntá kanska eldri!

Tíðin flýgur avstað, tá ið man hevur tað stuttligt; soleiðis er skúladagurin av, áðrenn eg havi nátt at hyggja eftir klokkuni eina ferð. Á veg út gjøgnum ta sokallaðu hurðina (her kalla tey tað eina hurð, sum í veruleikanum bert eitt træpetti á nøkrum hongslum), verði eg sum vanligt steðgað av tveimum gentum við stórum smílum á varrunum. „Profesora, por favor, como se dice mesa en inglés?", „Profesora, por favor, como se dice cuaderno en inglés", „Profesora...". Eydnan her er eyka skúlating.

## Fríggjadagur 3. apríl 2009

Hasta entonces, í dag var seinasti skúladagur mín í Chinchero. Tað varð rættiliga syrgiligt, syrgiligt at skula fara frá øllum hesum næmingunum, sum eg nú havi kent í ein mánaða.

Mikudagin hevði eg royndir við tveimum av annaðársflokkunum og seinastu tríggjar dagarnar havi eg brúkt stórt sæð hvørt sekund upp á at rætta 80 skrivligar uppgávur hjá næmingunum til síðstu royndirnar. Úrslitið var tíverri ikki serliga gott. Eg hevði annars roynt at stuðla teimum í nógvar mátar - eg royndi at gera royndina nógv lættari enn vanligt, gav teimum nógv fleiri stig fyri hvønn spurning man eigur og hjálpti teimum á ymiskan hátt til sjálva royndina. Men hóast hetta endaði besti flokkur mín við einum miðaltali upp á 34/89, har man skal hava 43/89 fyri ikki at dumpa...

Eg veit væl, at tað ikki er mín feilur, men at orsøkin sjálvandi er, at peruanska undirvísingin ikki er serliga góð. Tað er tó ringt ikki at verða eitt sindur syrgin, tá ið man noyðist at brúka 20 minuttir upp á at rætta hvørja uppgávu eftir royndina, tí man má sita og fylla allar blonku linjurnar út. Tíbetur eri eg ikki tann einasta, sum hevur roynt ð hetta. Sophia úr Svøríki, sum starvast á skúlanum, hevur havt enn verri royndir. Næmingar hennara fingu umleið 10/89 í miðal. Veruligi trupulleikin er, at peruanski næmingarnir als ikki eru vón við, at man stillar krøv til teir. Í endanum av skúlaárinum hava tey eina einkulta, men stóra próvtøku í øllum fakunum, har tey vera roynd í øllum fakum; hinir tíggju mánaðirnir sita teir heilt passivir í skúlastovunum og kopiera tað niður, lærarin skrivar á talvuna. Eitt annað løgið er, at einki hendur, um næmingarnir ikki klára seg serliga væl, eingin ger sær far um hetta. Eg veit jú væl alt hetta, men tað er ein løgin kensla at sita við, tá ið miðal í einum flokki er ein álvarsligur dumpikarakterur. Eitt slag av vónbroti.

At skula vera tann keðiligi og súri lærarin er ikki serliga hugaligt á seinasta arbeiðsdegnum her.

Hinvegin er man noyddur at greiða næmingunum frá, hvat eitt vánaligt royndarúrslit kann hava við sær.

Hóast Peru er nógv betur fyri enn nábúgvalandið Bolivia, liva heili 54% í ekstremum fátækradømi her og meginparturin av skúlabørnunum koma eisini úr sera fátøkum heimum, har foreldrini hava úr at gera við at fáa endarnir at røkka saman. Sum tað var hjá okkum í gomlum døgum, er tað týdningarmikið her at eiga nógv børn, so man hevur onkran at hjálpa sær við arbeiðinum heima við hús og á markini. Børnini hava lært, at enskt er sera umráðandi at læra, um man vil klára seg her og "verða til okkurt", koma víðari enn eldru ættarliðini. Um Cusco ikki er mest turistaði býurin í heiminum, má hann vera í topp fimm. Tað kennist tó sum, at stýrið í Peru ikki hevur skilt hetta; fáu enskttímarnar og vánaligu lærararnar gera, at støðið ongantíð verður serliga nógv hægri enn tað mest basala "Hello, how are you?". Fáir lærarar duga at læra frá sær og teir flestu hava ein sera autoriteran frálærustíl; pedagogikk ganga teir ikki høgt upp í. Broytingar tykjast tó at vera fyri framman í Peru; nýggj og nýmótans hugskot verða umrødd og alheimsgerðin hevur eisini havt við sær, at alsamt fleiri eru byrjaði at seta spurnartekin við gamla frálæruháttin.

Tá ið eg hyggi aftur á seinastu vikurnar her í Chinchero, ivist eg tó ikki í, at seinasti dagurin her eisini hevur verið besti dagurin. Fyri fyrstu ferð hevði eg uppmerksumheitina hjá øllum næmingunum, fyri fyrstu ferð sýntust tey at skilja týdningin av at læra. At sleppa teimum nú, ið alt endiliga byrjar at ganga eftir ætlanini, er ikki serliga lætt. Eg vil allarhelst verða verandi her og læra næmingarnar nakað týdningarmikið og nýtiligt, okkurt, sum kann nútímansgera gamla ríkið hjá inkarunum.

Áðrenn spaniararnir hertóku Suðuramerika, strekti inkararíkið seg frá mittasta partinum av Kili, upp gjøgnum Bolivia og Peru, norðara partinum av Argentina og til Ekvador og Kolumbia. Høvdu inkairnir sæð, hvørjum standi heilagi dalur teirra er í nú, so langt aftan fyri tað, sum rørir seg í nýmótans londunum, høvdu maktfullu mennirnir sikkurt vent sær í grøvum teirra. Í hesum stóra ríki var Cusco eygnasteinurin, "heimsins nalvi". Kanska er tað ikki ov seint at finna aftur hendan stórleika?

## Fakta

18. januar fór eg fyri fyrstu ferð í lívinum við einum flogfari einsamøll við Buenos Aires, høvuðsstaður Argentina, sum destinatión. Suðuramerika hevur í mínum hugaheimi ongantíð tykst serliga áhugavert. Tað er staðið, har øll hini longu hava verið – og man tímir sjálvandi ikki at gera sum "øll hini". Tá ið eg í desember endaði mítt arbeiði sum sjálvboðin á høvuðsskrivstovuni hjá hjálparfelagsskapinum Operatión Dagsverk ("OD"), í Keypmannahavn eftir fimm mánaðir, fekk eg hug at royna meg innan nakað heilt nýtt og øðrvísi. Eitt kvøldið fekk eg knappliga eitt hugskot um at fara til Peru og ein mánaða seinni var eg á veg til eitt heilt nýtt lív í Suðuramerika. Ætlanin var at ferðast runt i Argentina, Kili, Bolivia og Peru og arbeiða sum sjálvboðin ensktlærari í ávíkavíst Córdoba, Argentina, í ein mánaða og í Cuzco, Peru, í ein mánaða.

Eftir tríggjar mánaðir í spanska partinum av Amerika, fer leiðin aftur norður. Áðrenn heimferðina leggi eg leiðina umvegis enska partin av Amerika, New York, har eg skal halda 20-ára føðingardag mín á arbeiðaradegnum 1. mai saman við trimum OD-vinkonum.